


www.oljan.fo

**Jan Müller** 21 - 08 - 2013

# Cairn- Írland og Afrika avloysa Grønland

Bretska oljufelagið Cairn Energy, sum gjørdi ein øgiligan vørr í oljuleitingini í Grønlandi nøkur ár herfyri men sum gavst fyribils vegna turrar brunnar, leggur seg nú eftir at finna kolvetni í Írlandi og vestan fyri Afrika. Sambært felagnum hevur tað vón um í størri mun at hava eydnuna við sær í nýggju leitiøkjunum enn í Grønlandi, har tað brúkti einar 7 mia. kr. til at bora fleiri turrar brunnar í 2010 og 2011. Cairn upplýsir, at tað fer at bora í minsta lagi 5 brunnar komandi árið, 2 í Marokko og 2 í Senegal og ein vestan fyri Írland. Møguleikin at gera fund er millum 20 og 25% sigur felagið og vísir til, at møguleikin at gera fund í Grønlandi var 10%. Ein munur millum komandi boringar og hana í Grønlandi er tann, at hon byggir á 3D seismikk. Hetta var ikki støðan í leitingini í Grønlandi. Felagið fer at brúka umleið 3 mia. kr. til umrøddu boringar. Hóast tað ikki gekk sum Cairn ætlaði í Grønlandi, so hevur felagið kortini ikki slept Grønlandi. Eftir turru brunnarnar keypti Statoil seg inn í eitt av loyvunum hjá Cairn í Grønlandi. Um somu tíð vóru ætlaninar hjá Cairn lagdar á hillina. Tikið var eitt time out eftir ringu úrslitini. Cairn sigur, at tað seinni í ár fer at taka avgerð, um tað skal bora enn ein brunn í Grønlandi í seinnu helvt av 2014. Tað verður so saman við øðrum feløgum í Pitu-loyvinum í Vesturgrønlandi.